


## Balling skoraði tvey mál

Fyrrverandi NSÍ-framherjin lá enn eina ferð framvið, tá Næstved um vikuskiftið spældi ímóti Hvidovre í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Næstved vann dystin 3-0, eftir at tað hevði verið málleyst í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki legði Henrik Madsen Næstved framum beinanvegin, og síðani økti Ulrik Balling tvær ferðir.

## Tem aftur á blettinum

Tem Hansen, sum nakrar ferðir hevur spælt á føroyska fótbóltslandsliðnum, hevur skorað nøkur mál fyri Søllerød-Vedbæk í triðbestu donsku fótbóltsdeildini seinastu vikurnar. Og Tem var aftur á rætta staðnum um vikuskiftið. Søllerød-Vedbæk spældi ímóti Skovlunde, og Tem Hansen skoraði seinasta málið í 3-1 sigrinum.

NSÍ-AB 0-1 (0-1):

# NSÍ trívist illa heima

*NSÍ*

*AB*

**Bragdligu argjamenninir megnaðu at halda tætt, og so vigaði málið hjá Jobin Drangastein trý stig**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gongur ikki væl hjá NSÍ á heimavølli. Eftir 1-0 tapið ímóti AB í gjár siga tølini higartil í ár, at NSÍ í fimm heimadystum bara hevur vunnið fulla úrtøku ímóti oddaliðnum HB. Í hinum fýra royndunum hevur NSÍ tapt ímóti AB og Víkingi og spælt javnt ímóti B68 og KÍ.

At NSÍ – í hvussu er til í kvøld – er næstfremst, kemst av góðari úrtøkan á útivølli, har allir fýra dystirnir eru vunnir.

Soleiðis hevur tað ikki lagað seg undanfarnu árini hjá teimum í Runavík. Men í gjár sást, at teir hava ógvuliga ilt við at spæla seg til upplagdar málmøguleikar, og tá tað endiliga eydnast, so gongst heilt illa at fáa mál.

### AB góðan hugburð

Argjamenn hava nógvar spælarar við lítlum og ongum royndum í bestu deildini, men tað tóktust teir ikki serliga darvaðir av í gjár, og stutt undan hvíldini eydnaðist teimum at skjóta málið, sum eftir síðsta bríksl vísti seg at vera nóg mikið til sigurs.

Alex Mellemgaard lyfti frísparkssending úr høgru og í brotsteigin, bólturin varð beindur út frá aftur, og so smekkaði 18 ára gamli verjukendi miðvallarin, Jobin Drangastein, til av brotsteigarmarkinum. Bólturin streyk í málið aftan fyri sakleysa NSÍ-málverjan, og so vóru fyritreytirnar hjá gestunum uppaftur betri.

Hugburðurin var fínur, teir arbeiddu nógv, vóru avgjørdir í nærdystunum og vunnu nógvar returbóltar, og so megnaðu teir fult og heilt at byrgja fyri, at Károly Potemkin, sum fyrstu umførini skoraði so nógv, upp á nakran máta gjørdist vandamikil.

Rói Danielsen og Tehe Aristide vóru sannir brandar í miðverjuni, og tað kom ikki óvart á, tá ið NSÍ venjarin miðskeiðis í seinna hálvleiki gjørdi av at skifta toppskjúttan út.

### Thomas Hans í mál!

Tá Klæmint A. Olsen og Øssur Dalbúð vórðu settir inn, tóktist tað, sum at tað skuldi eydnast heimaliðnum at koma úr hálvhjartaðu og lítið sannførandi ringrásini og at seta meiri ferð á. Framvegis vóru uppløgdu málmøguleikarnir fáir, og tað bøtti ikki um, at Bogi Løkin varð fluttur frá sentralum miðvallarplássi og út í høgru.

Sum tíðin leið, øktist trýstið á AB-málið, sum innskifti álopsspælarin Thomas Hans Rubeksen noyddist at verja í yvirtíðini, tá Heðin Stenberg var farin skaddur av vøllinum. Stutt frammanundan hevði Øssur Dalbúð sent á tvørtræið, og tá ið AB-málverjin og Jann Ingi Petersen brustu saman, endaði bólturin í AB-málinum, men dómarin kolldømdi, og tá Óli Hansen eftir innlegg stútaði fram við málinum, var tað fráboðan um, at hetta var ikki dagurin hjá NSÍ.

### AB við at fóta sær

Tað var ikki frítt, at tað kendist sum um, at tað kundi eydnast heimaliðnum at skora fleiri mál, um teir høvdu havt fingið hol á. Tað eydnaðist ongantíð, og gestirnir vóru eins vandamiklir, tá teir fóru í mótálop. Nikolaj Eriksen dugdi væl at varðveita bóltin, meðan hann bíðaði eftir, at viðspælararnir skuldi flyta seg fram á vøllin og bjóða seg til, og hóast heimaliðið var nærri við, so var tað avgjørt ikki soleiðis, at AB ongar aðrar málmøguleikar hevði enn tann eina, sum teir vunnu uppá.

Evrard Blé var eyðsýndur á miðvøllinum, har hann skavaði nógv til sín, John Hansen og vongverarnir vóru raskir og knáir, og liðavrikið vísti sum heild, at AB er væl á veg at fóta sær í fremstu røð.

Eftir góðu gongdina á útivølli hevur verið roknað við, at NSÍ skuldi fara at verða millum fremstu avbjóðararnar hjá oddaliðnum. Um tað skal eydnast, so skal úrtøkan á heimavølli vera væl betri, enn hon var í gjár, og enn hon hevur verið higartil í ár.




*Einar T. Hansen og hinir í NSÍ formáddu sær á heimavølli í gjár lítið ímóti Kenneth Jacobsen og hansara liðfeløgum í AB, sum kundu fara suðuraftur við trimum stigum í viðførinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Verjurnar eru ov tættar

NSÍ miðvallarin, Bogi Løkin, var vónbrotin um, at tað heldur ikki hesa ferð eydnaðist at vinna á heimavølli:

– Eg haldi, at vit vóru eitt sindur óhepnir, men samstundis mugu vit ásanna, at vit ikki megna at spæla okkum til nógvar upplagdar møguleikar, tá mótstøðuverjan er stór og tjúkk. Fyrsta hálva tíman gekk spælið væl, men vit fingu ikki mál, og tá teir so hava skorað eftir deyðbólt, verður tað uppaftur torførari.

*Nú dragnaðu tit í toppstríðnum?*

– Vit hugsa ikki so nógv um, hvussu tað gongst hjá hinum liðunum. Hjá okkum er neyðugt at fokusera upp á ein dyst í senn. Um vit hesa ferð høvdu havt skorað beinanvegin, so hevði tað ivaleyst tørnað øðrvísi út. Men vit skoraðu ikki, og argjamenn vóru skilagóðir, hóast tað ikki var teirra uppgáva at skapa dystin, staðfestir Bogi Løkin, sum saman við liðfeløgunum nú fer at fokusera upp á dystin í Klaksvík annan hvítusunnudag.

**jh**

## Svongdin og viljin bóru langt

Allan Mørkøre, sum saman við John Petersen er venjari á Argjum, var sjálvandi ógvuliga fegin um úrslitið í Runavík:

– Ungu menninir hava ikki nógvar royndir, men teir hava stóran vilja, og teir eru svangir eftir at spæla og vinna. Avrikið vísti, at vit hava møguleika ímóti øllum hinum liðunum. Vit stóðu einki aftan fyri mótstøðuliðið, og tað var einki forgjørt í, at tað vóru vit, sum vunnu, helt Allan Mørkøre.

– Eg eri errin av okkara monnum. Vit vóru hepnir, at teir ikki skoraðu, tá teir í seinna hálvleiki løgdu trýst á, men vit kundu frammanundan havt økt um leiðsluna.

Í samanbresti við Jann Inga Petersen varð AB-málverjin, Heðin Stenberg, so illa skaddur, at hann noyddist av vøllinum. Hann verður ikki tøkur, tá AB hósdagin fer at spæla seinnu hálvfinaluna í steypakappingini í Streymnesi:

– Vit arbeiða við at finna ein avloysara, men tað verður ikki Magnus Poulsen, sum hevur verið á Argnum. Hann er burturstaddur, sigur Allan Mørkøre.

**jh**

## Knæskelin fór úr lið

Heðin Stenberg noyddist í gjár av vøllinum í Runavík, tá hann brast saman við mótstøðuleikara. Málverjin var fluttur á Landssjúkrahúsið alt fyri eitt, og í gjárkvøldið var staðfest, at hann neyvan fer at verja málið hjá AB aftur undan summarsteðginum. Heimasíðan hjá AB skrivar, at knæskelin fór úr lið, og annað slit er í knænum. Hann verður tí ikki dystarklárur komandi fýra vikurnar.

**-uni**